# Ísland fær umrøðu

Ísland fær drúgva umrøðu í írska blaðnum Irish Times í dag. Blaðið umrøður tað sokallaða Icesave-málið, sum íslendingar skulu taka støðu til á fólkaatkvøðu 6. mars. Blaðið endurgevur Ólag Ragnar Grímsson, forseta fyri at siga, at íslendingar fara at rinda tað, sum teir skylda umheiminum, og at tað verður gjørt í samsvari við tað, sum partarnir avtala. Forsetin sigur við Irish Times, at íslendskir bøndur, fiskimenn, lærarar og onnur noyðast í mong ár at bera byrðarnar orsakað av virkseminum hjá einum banka uttanlands.



# de Villepin fríkendur

Ein dómstólur í París fríkendi í gjár fyrrverandi franska forsætisráðharran Dominique de Villepin fyri at hava staðið fyri einari útspillingarherferð ímóti fyrrverandi innanríkisráðharranum og núverandi forsetanum, Nicolas Sarkozy. Málið byrjaði í 2004. Ákæruvaldið vildi vera við, at Dominique de Villepin hevði roynt at seta saman søgur um, at Sarkozy var sekur í korrupsjón. Endamálið var atr forða fyri, at Sarkozy skuldi vinna forsetavalið í 2007. Villepin hevur alla tíðina víst ákæruni frá sær, og í gjár kom dómstólurin til somu niðurstøðu.



*Tvey ár eru liðin, síðani flakavirkið í Miðvági lat aftur. - Politikkararnir áttu at gjørt sítt til, at tað kann latast upp aftur, sigur Albert Ellefsen, borgarstjóri í Vága kommunu*



# Okkara virki má latast upp aftur

**- Nei, hetta kom ikki væl við, sigur Albert Ellefsen, borgarstjóri í Vága kommunu. Í gjár kundi hann fyrst gleðast um, at Vága kommuna hevði lægsta arbeiðsloysið í landinum. Men samstundis mátti hann harmast um, at fleiri fólk í hansara kommunu mistu arbeiði á flakavirkinum í Vestmanna**

ARBEIÐI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Miðvágur:** - Vit vóru óttafull, tá flakavirkið her í bygdini lat aftur fyri eini tveimum árum síðani. Tað vísti seg kortini, at nógv teirra fingu arbeiði aftur aðrastaðni.

- Tað kann vera orsøkin til, at arbeiðsloysið er so lágt, sigur Albert Ellefsen, nú nýggjastu tølini frá Hagstovuni eru kunngjørd.

Hann kann eisini fegnast um, at skattainntøkan í Vága kommunu var so at siga tann sama í 2008 og í 2009. Tað eru helst ikki allar kommunur, ið kunnu siga tað sama sum tey.

Men hesi nýggjastu tølini mugu kortini lesast við skerdari gleði. Í gjár kom nevniliga fram, at fleiri av flakafólkunum hjá Fiskavirking í Vestmanna hava mist sítt arbeiði.

Tað sum ger tað so álvarsamt fyri Vága kommunu í hesum sambandi er, at nógv teirra eru búsitandi her, men hava arbeitt á virkinum í Vestmanna.

- Tað er altíð keðiligt hjá teimum sum gerast arbeiðsleys. Tað er týdningarmikið at fólk hava okkurt at fara upp til, staðfestir Albert Ellefsen.

## Rakar lægstlønt

Tað vóru døpur tøl, ið frættust frá Hagstovuni í gjár. Enn einaferð kundu hagtølini staðfesta, at fleiri føroyingar eru vorðnir arbeiðsleysir.

Í desember mánaði var arbeiðsloysið komið uppá 5,3 prosent, og var hetta ein vøkstur uppá 3 prosentstig síðani januar í fjør.

Uppgerðin vísti somuleiðis, at flest mannfólk ganga uttan arbeiði: 812 menn og 580 konufólk vóru fulltíðararbeiðsleys í jólamánaðinum.

Størsta arbeiðsloysið í desember var í Suðuroy, meðan Norðoyggjar, Sandoy og á Streymoy var tað omanfyri miðal.

Tvey øki skaraðu kortini framúr, um ein kann siga tað so: Bæði í Vágum og í Eysturoynni var arbeiðsloysið niðri á 4,3 prosentum.

Men hjá teimum sum eru rakt av arbeiðsloysi, er hetta neyvan hugaligur lesnaður. Og sjálvur dugir Albert Ellefsen at síggja hetta við arbeiðsloysinum sum ein stóran samfelagsligan trupulleika.

- Tað vísir seg ofta, at tað eru tey lægstløntu sum verða rakt av arbeiðsloysi - og tey ungu.

- At arbeiðsloysið rakar alt fleiri og fleiri ung, síggi eg sum eitt stórt hóttafall. Henda gongdin kann eisini føra til sosialar trupulleikar, sigur hann álvarsamur.

## Lat virkið upp

Fyri góðum tveimum árum lat flakavirkið í Miðvági aftur. Hetta var sjálvandi ein álvarsom støða fyri kommununa og bygdarfólkið.

Hóast kommunan sum so ikki kann gera nakað við virkið, hevur Albert Ellefsen kortini sínar hugsanir um framtíðina hjá og í hesum tóma virkisbygninginum.

- Vit hava eitt brennandi ynski um, at virksemi aftur fer at koma á virkinum, soleiðis at fólk sleppa til arbeiðis, sigur borgarstjórin, og vísir til eitt uppskot hjá Miðflokkinum á tingi.

Sambært hesum uppskotinum skuldi loyvi gevast til at innflyta frystan tosk, men líkt er til at politikkarar eru ræddir fyri at geva hetta loyvið.

- Eg haldi, at teir skuldu avgreitt hetta málið skjótast gjørligt, soleiðis at fólk kunnu fara til arbeiðis á fiskavirkjunum, sigur Albert Ellefsen.

# 52 tungumál og 40 filmar

**Felagið Kovboyfilm fer nú at gera Føroyar enn meiri kendar úti í heimi.**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Fólkini aftanfyri felagið Kovboy-film hava longu lagt 28 filmar út á Youtube. Og seinni í ár koma 12 aftrat.

Hetta eru alt filmar úr føroysku náttúruni og øðrum myndum og evnum úr fólkalívi okkara.

Nú hevur Kovboy-film tikið eitt stig aftrat fyri at røkka enn longur út við at vísa Føroyar sum ferðamannaland. Filmarnir eru allir gjørdir við enskari talu, men nú ber til at hyggja eftir teimum við undirteksti á íalt 52 tungumálum.

Millum hesi málini eru enskt, franskt og kinesiskt.

Nógv fólk hava longu vitjað heimasíðuna hjá Kovboy-film. Síðani september 2008 hava ikki færri enn 83.000 hugt eftir onkrum av filmunum hjá felagnum.

Filmarnir hjá Kovboy-film kunnu annars síggjast á www.youtube.com/kovboyfilm.